**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

## Reingerðarfólk til Fíggjarmálaráðið

at byrja 1. nov. 2007

Tann sum verður settur, verður við at leggja karmar um trivnaðin í húsinum.

**Tí vænta vit**
at tú ert nærlagdur, arbeiðir sjálvstøðugt og hevur royndir frá líknandi starvið.

**Vit kunna bjóða**
eitt starv, ið er 22½ tíma um vikuna. Løn og setanarviðurskiftir eftir sáttmálanum ímillum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Í húsinum eru fleiri reingerðarfólk, ið tú kemur at samstarva við.

Vilt tú vita meira um starvið, so ber at venda sær til Birgit Hansen á tlf. 352600.

Hevur hetta tín áhuga. Vinarliga send okkum eina skrivliga umsókn við avrit av ummælum og upplýsningum, um viðkomandi starvsroyndir, sum skal vera okkum í hendi innan fríggjadagin 5. okt. 2007 kl. 15.30. (Merk brævbjálvan: Umsókn).

**TOLL- OG SKATTSTOVA FØROYA**
**Stýrið**
**Postrúm 2151**
**FO-165 Argir**

*Gera okkara til fyri at skapa arbeiðsgleði*

## LÆRARI

til Kvívíkar skúla

Søkt verður eftir lærara frá 22. oktober og restina av skúlaárinum. Starvið er 27 undirvísingartímar.

| | |
|---|---|
| **1. og 2. flokkur:** | handverk og list |
| **3. og 4. flokkur:** | handverk og list, danskt og stuðul |
| **4. flokkur:** | enskt |
| **5. og 6. flokkur:** | nátttúra/tøkni, kristni og søga |
| **7. flokkur:** | kristni, enskt og lívfrøði |

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlanum í hendi seinast 1. oktober kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Bjarna Heinesen, á tlf. 472400 ella fartlf. 211504.

**Kvívíkar skúli** er ein 4 flokkaður skúli við næmingum frá 1. til 7. flokk. 6 lærarar starvast við skúlan. Í skúlanum ganga 50 næmingar.

**Kvívíkar skúli**
Frammi í Gerði 6 · FO-340 Kvívík · Tlf. 472400 · kvi@skulin.fo

## SJÓBJARGINGARSTØÐIN MRCC- Tórshavn

E-mail: mrcc@mrcc.fo * www.mrcc.fo
Tlf: +298-351302 * Fax: +298-351301
Inmarsat C: 423 116210

### Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar innan fyri hesar knattstøður:

61°00,0 N 004°25,0 W
61°35,0 N 004°25,0 W
61°35,0 N 003°20,0 W
61°00,0 N 003°20,0 W

Felagið Chevron kannar økið.

| | |
|---|---|
| Byrja verður: | 18.09.2007 |
| Arbeiðið tekur væntandi: | 14 dagar |
| Skipanavn: | Malene Østervold |
| Kallibókstavar: | LCIU3 |
| Heimstaður: | Bergen |
| Fiskiveiðiumboð: | Absalon V. Eliasen |

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um arbeiðið fáast frá Tórshavn Radio, á heimasíðuni hjá sjóbjargingarstøðini, www.mrcc.fo, ella á telefon 351302.

**Sjóbjargingarstøðin**

Eiðis kommuna

## Lýsing eftir dagrøktara

Søkt verður eftir dagrøktara til gestarøkt o.a. til kommunalu dagrøktina í Eiðis kommunu, at byrja 1. oktober.

Skrivlig umsókn verður at senda til dagrøktarskipanina í kommununi

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til dagrøktarleiðaran á tlf. 210588 ella 423588

*Eiði, tann 17. september 2007*

**Dagrøktarskipanini**
**í Eiðis Kommunu**

## AT. H & J

Søkt verður eftir 2 húsasmiðum til Danmarkar (Keypmannahavn), at byrja í okt. '07. Nógv arbeiði fyri framman. Til at hoyra nærri vinarliga ring til:

**André:** ................ +45 20 71 62 23

**Bragi:**.................... +45 20 71 62 24




## BILFØRARI SØKIST TIL SÓPINGARBIL

**Koyrikort til lastbil krevst**

Arbeiðsøkið fevnir um sóping av vegum í Vágum og Norðurstreymoy, umframt tøming av vegbrunnum í somu økjum. Arbeiðið kann í stóran mun leggjast til rættis av bilføraranum. Ætlanin er, at tú skalt arbeiða sjálvstøðugt, men ein fær, um neyðugt, upplæring í neyðugum arbeiðsgongdum og brúki av amboðum.



**Áhuga? – Ring 212104 - 332104**

## Floksleiðslufundur

Boðað verður til floksleiðslufund í hølunum hjá Losjuni á Tinghúsvegi 18, leygardagin 22. september kl. 11.30.

**Føroya Javnaðarflokkur**




> Telefonráðgeving
> Anonymitet
> Tagnarskyldu
> Stundir at lurta

Bláí Krossur

www.blakross.fo